# Miðflokkurin biður Løgmann um at steðga verkbanninum

Í áheitan á Løgmann Jóannes Eidesgaard um at steðga verkbanninum, sigur Miðflokkurin m.a. " Ásannandi, at annar samráðingarparturin longu treytaleyst hevur tikið undir við uppskoti semingsmanna, og at bakland landsstýrisins, t.e. samgongumeirilutin, sigur seg ynskja frið aftur á arbeiðsmarknaðinum, heitir Miðflokkurin á Løgmann um at vísa samfelagsábyrgd og steðga verkbanninum."

Miðflokkurin sigur harumframt, at allir føroyingar harmast um vanlukkuligu støðuna, ið tjóðin er komin í av arbeiðsteðginum. Heitt verður á Løgmann um at, um neyðugt er, taka ábyrgarhavandi Landsstýrismann av ræði, tí hann í hesum málið hevur víst stuttskygni:

Miðflokkurin skrivar: "tí hvørki samfelagið sum heild, ella tey útjaðararøkir, sum aftur hesaferð á serligan hátt merkja sviðan av arbeiðssteðginum, eiga at bera prísin fyri tí stuttskygni, sum eyðkennir hesa avgerð fíggjarmálaráðharrans.

Avgerðin liggur í hondum samgongunnar, umráðandi er at taka hana, tí meðan tosað og skrivað verður, farast samfelagsvirðir." Brævið er stílað Løgmanni, og dagfest fríggjadagin.

**nud**



*Myndatekstur: Fortíð møtir framtíð uttan fyri Tvøroyri, Jóhanna røkir ferðasambandið til Suðuroyar meðan verkbann er, og Smyril, hann verður liggjandi við bryggju arbeiðssteðgurin er av*

*Mynd:Fróði Mortensen*

# Krevja at Suðuroyggin verður tryggjað

**Samferðslubólkurin fyri Suðuroynna við Jacob Vestergaard á odda krevur at landsstýrið tryggjar at Suðuroyggin ikki aftur verður avskorðin frá umheiminum orsakað av arbeiðssteðgi**

SAMFERÐSLA

*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Í tíðindaskrivi fríggjakvøldið átalar Samferðslubólkurin fyri Suðuroy harðliga, at Suðuroyggin enn einaferð verður rakt av ósemjum á arbeiðsmarknaðinum. Tey krevja at politikarar tryggja, at henda støða ikki kemur í aftur.

Bólkurin sigur at tað harmar tey almikið, at hvørja ferð eitthvørt er galið á arbeiðsmarknaðinum so skal Suðuroyggin sum tann einasta kenna svian av hesum.

Politikarar fáa sítt í tíðindaskrivinum, har sagt verður at politikarar ferð eftir ferð hava lovað, at hetta ikki hendir aftur:

"Ferð aftaná ferð koma politikarar okkara út við somu søgu, at hettar ikki skal henda aftur, tað má tí verða eitt ófrávíkiligt krav, at henda støða nú einaferð verður loyst. Tað verður tí við spenningi vit Suðuroyingar nú fara at lurta eftir okkara politisku umboðum, um ætlanin enn einaferð er at halda okkum fyri turrasta spott við somu boðum, bert í nýggjari útgávu, ella um menn eru somikið at sær komnir í 2005, at henda ótolandi støða verður loyst endaliga." skrivar bólkurin, ið hevur fyrrverandi landsstýrismannin Jacob Vestergaard sum formann.

### Krevja fleiri túrar

Í sama skrivi krevur bólkurin at túratalið til og úr oynni verður økt við minst einum túri afturat um dagin.

Bólkurin ásannar at framburður og trivnaður er treytaður av títtleikanum av ferðum. Víst verður somuleiðis til leiðina millum Klaksvík og Leirvík, har eru sambært bólkinum 19 túrar dagliga. Teir vísa á at í sekstitalinum var ein túrur við Pride á hesari leið, hetta var sama tal sum úr Suðuroynni. Úr Suðuroynni er talið økt til tveir túrar hesið nógvu árini: "Tað verður mangan ført fram, at orsøkin er vantandi peningur í samfelagnum. Í nevnda tíðarskeiðið eru útreiðslurnar hjá samfelagnum øktar við fleiri 100 tals milliónum uttan at møguleiki hevur verið at finna nakran pening til Suðuroyarleiðina.Tað mátti verið gamaní at kunna funnið pening, nú skipið, vit hava bíða eftir í yvir eitt ár sambært heilar 30 mill. kr. bíligari." Skrivar bólkurin.




Vika 41, 2005
www.kaupthing.fo

# Partabrøv undir trýsti

MARKNAÐARRÁK

Seinastu dagarnar hava alheims partabrævamarknaðir verið undir hørðum trýsti. Sum vanligt er trýstið skapt í USA. Amerikanski tjóðbankin (Fed) hevur nú síðani juni 2004 javnt og samt hækkað leiðandi rentuna úr 1,00% í 3,75%. Nú rentan er hækkað so mikið nógv og tá Fed samstundis metir at eitt nú húsaprísirnir í USA eru hækkaðir ov nógv, verður dúgliga gitt, um rentuhækkingarnar fara at taka dik á seg ella ikki. Vandin fyri øktum rentuhækkingum kann tálma inntøkurnar hjá partafeløgunum; tískil eru partabrævakursirnir sum heild lækkaðir. Fríggjadagin vóru prísvakstrartøl úr USA kunngjørd. Hesi gjørdust lægri enn væntað, tískil kann roknast við at partabrøvini fara at standa seg betur næstu vikurnar.

### Renturnar hækka

Lánsbrævarenturnar hildu áfram at hækka í farnu viku. Danska 10-ára rentan hækkaði 0,10% til 3,24%. Tað eru gitingarnar um fleiri rentuhækkingar frá amerikanska tjóðbankanum, sum eru høvuðsorsøkin. Annars vera realkredittlánsbrøv í andgletti allan hendan mánaðin í sambandi við innloysingarfreistina 31. oktobur.

### Roknskapir úr USA góðir

Næstu vikurnar fara roknskaparkunngerðirnar fyri 3. ársfjórðing at seta dám á partabrævamarknaðirnar. Fyribils hava nøkur amerikonsk virkir kunngjørt roknskap. Fyri hesi er myndin tann, at inntøkurnar eru 15,7% hægri enn fyri ári síðani. Samstundis eru inntøkurnar 0,6% hægri enn væntað. Heldur hendan gongdin fram eru útlit fyri, at roknskaparkunngerðirnar fara at stimbra partabrævagongdini í næstum. Tó mugu fleiri virkir kunngera áðrenn ein nøktandi mynd fæst av støðuni.

**Donsk 10-ára renta**




**Vísital fyri norrøn partabrøv**




**Gjaldoyru**

| | Kursur | +/- % | |
|---|---|---|---|
| USD | 618,17 | 0,5% | ↑ |
| JPY | 5,42 | 0,3% | ↑ |
| GBP | 1.093,22 | 0,9% | ↑ |
| NOK | 95,50 | 1,2% | ↑ |

**Íløgufeløg**

| | Kursur | +/- % | |
|---|---|---|---|
| Lánsbrøv í DKK | 105,38 | -0,3% | ↓ |
| Evru Lánsbrøv | 174,72 | -0,5% | ↓ |
| Norrøn Partabrøv | 99,06 | -1,9% | ↓ |
| Altjóða Vøkstur | 66,93 | 0,6% | ↑ |

*Broytingar eru útroknaðar í mun til fyri viku síðan. Myndirnar vísa gongdina seinastu 3 mánaðirnar.*